


*Nr. 23* *16. november 2014* *74. árg.*

# Dópsins gáva

Undir borðhaldinum eftir ein barnadóp segði ein pápi nakað um tað størsta, sum nakrantíð fór at henda barninum. *Tað var júst nú hent har niðri í kirkjuni.* Ja, hvussu lívið so fór at laga seg hjá tí lítla, sum nú lá og svav; um barnið fór at liva á lívsins ljósu síðu ella á skuggasíðuni; um tað í gjøgnum virki sítt í lívinum fór at seta spor eftir seg, ella bara gjørdist ein vanligur, lítil gráklæddur maður; alt hetta kom í aðru røð í mun til, at tað nú var doypt. Nakað soleiðis fullu orðini, og tey eru galdandi, hvørja ferð eitt barn verður borið til dópin.

Eisini vit fingu ein dag krossmerkið rist fyri andlit og bróst og vóru doypt. Men hvussu er vorðið hjá tær í dag? Hvílir tú í hesum? Kann eg minna teg á tað, sum Paulus skrivar til kirkjuliðið í Filippi? Hann skrivar: ”Fullvísur sum eg eri í tí, at hann, sum byrjaði í tykkum góðan gerning, vil fullføra hann alt til Jesu Krists dag.”

So ljós og lyftisrík eru útlitini hjá okkum. Hann, sum í dópinum byrjaði góðan gerning í okkum, vil fullføra hann. Hansara trúfesti er ongantíð uppi. Eg eri kanska um at missa mótið, og hini hava kanska ilt eyga til mín. Men hann, harri okkara Jesus Kristus, sleppir mær ikki, men vil fullføra tað, sum hann hevur sett sær fyri við mær.

*Takk, Jesus, fyri dópin mín,*
*tá tókst tú meg í favn,*
*mær gavst til faðir faðir tín,*
*mær gavst gudsbarna navn.*

*Eg trúgvi á teg, Jesus Krist,*
*tú doyði fyri meg!*
*Til faðirin vil andin vist*
*mær vísa frelsuveg.*

# Tak Gud í álvara: 1

*"Hvønn dag hildu tey sær samhugað støðugt í halgidóminum ..."*
*Áps. 2,46*

Roknað verður við, at tað eru meir enn ein hálv milliard útinnandi kristin í verðini. Men Kirkjan hevði ikki verið til í dag, um tað ikki var ein lítil lærusveinaflokkur, sum elskaði og var trúfastur móti Kristusi. Guds viðurskifti vóru ikki eitt arbeiði, sum varð gjørt parttíð, og kærleikin hjá teimum fyrstu kristnu til Kristusar var ikki bara av og á ella bara so hissini.

Lívið við Gudi var raðfest fremst hjá teimum. Um tú vilt taka Gud í álvara, so mást tú steðga á og hugsa um tað, sum tey tóku í álvara.

Tey tóku lívið í meinigheitini í álvara. Tey trúgvandi møttust hvønn dag í templinum. Ert tú eitt kirkjufólk, sum bara kemur "av og á"? Gerst tú argur, um tú heldur, at gudstænastan varar ein tíma ov leingi, ella um prestur brúkar 10 minuttir eyka? Er einaferð um vikuna nóg mikið fyri teg?

Soleiðis var tað ikki fyri tey nýtestamentligu kristnu! Hvat var tað, sum rak tey avstað at koma í Guds hús hvønn dag? Kórið og orkestrið í templinum? Fjølmiðlar ella ungdómsskráir? Høvdu tey betri stundir og færri skyldur, enn vit hava? Nei, alt í lívi teirra var torførari, tók longri tíð og var minni hugaligt. Og kortini so broyttist alt hetta, tá ið tey høvdu møtt Jesusi. Tey settu hann fremst, og tey møttust støðugt í templinum hvønn dag. Teimum longdist eftir at savnast í Harrans nærveru, tí tey trúðu lyfti hansara: "... hvar sum tveir ella tríggir eru komnir saman í mínum navni, har eri eg mitt ímillum teirra." Matt. 18,20.

At taka Gud í álvara hevur við sær regluligan áhuga í øðrum kristnum, og at vit saman lurta eftir Guds orði og líva hvør annan upp. Hebr. 10,25. Tær tørvar hesa heilt serligu dimensjónina av vinalagi við Gud, sum bert er at finna, har hansara familja savnast um hann.

"... et Ord til Dagen".
*Effie Campbell* umsetti.

# Tak Gud í álvara: 2

*"... tey hildu fast saman um ... samfelagið og ... bønirnar."*
*Áps. 2,42.*

Tey tóku bøn í álvara. Nýtestamentliga kirkjan varð gitin í bøn.

"Tey vórðu øll fylt við hinum heilaga anda," eftir at tey í tíggju dagar høvdu verið sameind í bøn uppi á loftsstovuni. Hvat hendi so? Tey settu eina kirkju á stovn, sum enn eftir tveimum túsund árum hevur ávirkan á verðina. Fánaði teirra bønarlív, tá ið teir so høvdu grundað eitt kirkjulið? Als ikki! "Tey hildu fast saman um læru ápostlanna og samfelagið og breyðbrótingina og bønirnar." Áps. 2,42.

Felagsskapur teirra helt á at byggja á bøn. Hann – felagsskapurin – var borin í heim, komin til sættis og gjørdur virkisførur gjøgnum bøn. Hetta fyrsta kirkjuliðið hevur borið hesa sterku bíbilsku meginreglu víðari til okkara, at tú fært einki, sum veruliga hevur týdning, og sum skal vera varandi, uttan ígjøgnum bøn. Í dag er tað so, at um tú vilt tryggja tær, at fá fólk koma í kirkju, so skalt tú bara lýsa við bønamøti.

Hvussu nógv biður tú? Hvat fær teg at kenna teg fremmandan, har ið biðið verður? Er tað leysasøgan um, at bøn er hart arbeiði? Tað er tað ikki, um tínar raðfestingar eru í lagi. Bøn kann gera tað trupla í tilveruni lættari og meira fruktbart. Áhaldandi bøn lyftir teg upp á eitt hægri, positivt støði, har tú lærir at avrika meira, meðan tú upplivir ein djúpan frið í hjarta og sinni.

Jesus segði: "Komið higar til mín øll tit, sum arbeiða og ganga undir tungum byrðum, og eg vil veita tykkum hvílu. Takið upp á tykkum ok mítt og lærið av mær; tí at eg eri spaklyntur og eyðmjúkur av hjarta, og tá skulu tit finna hvílu fyri sálum tykkara. Tí at gagnligt er ok mítt, og lætt er byrði mín." Matt. 11,28-30. Álvaratos: Man tað vera nakar annar betri máti at liva uppá?

"... et Ord til Dagen".
*Effie Campbell* umsetti.

# Kletturin

Í 5. Mós.32,4 stendur skrivað: Hann er kletturin, fullkomin eru verk hans, tí at allir vegir hans eru rættlæti, trúfastur Gud uttan svik; rættvísur og rættlátur er hann.

Ja, Harri, eg boyggi meg. Fyrigev mær mín harm og mítt ótol. Fullkomin er tín gerningur! Alt, sum er skeivt í lívi mínum, er mín egna skyld. Alt, sum tú gert, er rætt. Vegir tínir eru teir bestu hjá mær at ganga.

Harri, tú skalt ráða og ikki eg. Vilji mín ber mær bara sorg. Tá ið eg haldi, at eg sjálv(ur) veit hin besta vegin, so før meg tó hagar, sum tú vilt.

Fari eg ikki av egnum vilja, so før meg á tín veg, og eg spyrji meg ongantíð til ráðs. Tú skalt velja fyri meg.

Kletturin er navn títt. Tí líti eg á teg. Tú ert trúfastur og tryggur sum fjallið. Ongantíð tú svíkur meg. Ongantíð troytkast tú. Rættvísur og rættlátur ert tú.

Av sonnum: fullkomin eru verk tíni.

*t.* týddi.

# Jesus – Guds offurlamb

Einaferð var eingin synd, óndskapur, einki hatur, kríggj og ongar sjúkur á jørð. Alt var friður og semja. Men ein dagin smeyg slangan – hin óndi djevulin – sær inn í Edens urtagarð. Tá vendiu menniskjuni sær burtur frá Gudi og fylgdu djevlinum, tá komu synd, sorg, sjúka og hatur inn í verðina. Men Gud elskaði verðina og vildi frelsa hana og gera bót fyri menniskjuni, sum høvdu syndað. Tá sendi hann Jesus, sum gjørdist Guds offurlamb. Gud sendi ikki eina bók, eina religión, eitt ritual, tá ið hann skuldi frelsa verðina. Hann sendi ein mann – ein persón, Jesus, Guds son, sum gjørdist okkara staðgongumaður og tók á seg allar okkara syndir, sjúkur og revsing – so at vit sleppa undan. Av tí at hann tók okkara syndir, kunnu vit verða grødd

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 16. nov. | Tekstur: | Matt. 26,26-29; | bíbliuorð: | Jóh. 6,48 |
| 23. nov. | Tekstur: | Matt. 14,23 + Jóh. 11,41- 42 + 17,9 + Luk. 22,41-43 + 23,34+46; | bíbliuorð: | Job. 22,27a |
| 30. nov. | Tekstur: | Áps. 12,1-17 + Matt. 7,7-8; | bíbliuorð: | Matt.7,7 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 24* *30. november 2014* *74. árg.*

# Fyrigivið

Summi kunna uppliva, at Guds hjálp kemur til teirra í dreymi. Til dømis segði ein kona frá, hvussu Gud hevði hjálpt henni á slíkan hátt. Hon hevði av ymsum orsøkum ígjøgnum eina tíð verið tung í huga. So droymdi hon eina náttina, at hon í kolsvørtum myrkri stóð á botninum á einum djúpum brunni. Tá hoyrdi hon eina rødd, sum segði: ”Hygg uppeftir!” Og tá ið hon hugdi uppeftir, stóð á náttarhimlinum yvir høvdi hennara ein bólkur av strálandi stjørnum, sum til samans skapaðu orðið: Fyrigivið.

Fyrigivið! Tað er júst tað, sum Gud fyrst og síðst arbeiðir uppá, so at Orðið fer at lýsa fyri okkum, og tað merkir tað sama sum, at vit mega festa eygu okkara á Jesus og tað, sum hann hevur gjørt fyri okkum. Tað er tað mest umráðandi í tí at vera kristin.

Tað er eisini boðskapurin í líknilsinum um skuldarbundna tænaran. Har sigur Jesus okkum, at skuld okkara hjá Gudi er nógv størri enn vit halda. Hann vísir okkum síðu okkara í Guds roknskaparbók og sigur: ”So nógv skyldar tú! Tíggju túsund talentir", sum eru umleið 40 milliónir krónur í okkara peningi. Ein púra ómøgulig skuld! Jesus sigur okkum, at vit standa í skuld upp um bæði oyru. Hann vil hava okkum at skilja, at vit eru stødd niðri á botni í einum djúpum, myrkum brunni.

Og hví? Fyri at vit umsíðir skulu bera eyga við orðið, sum við stjørnuskrift stendur skrivað yvir lívi okkara og hevur staðið har, síðani vit vórðu doypt. Orðið **FYRIGIVIÐ.**

*Fest títt eyga á Jesus,*
*hygg inn í hans andlit so kært.*
*Og øll heimsins gleði tá fánar burt*
*í tí náði og dýrd, ið tú sært.*

# Tak Gud í álvara: 3

*“ ... ikki skilja okkum frá okkara egnu samkoming ...” Hebr. 10,25.*

Tey tóku Guds orð í álvara. “Tey hildu fast saman um læru ápostlanna.” Áps. 2,42.

Kanningar vísa, at persónligur bíbliulestur er minni vanligur millum nútíðar kristin, enn bøn er. Guds orð, sum styrkir okkum at megna dagsins avbjóðingar, hava vit skift út við cappuccino og venjing í fitness centrum. Okkara bíbliulestur verður avmarkaður til sunnudagsprædikuna hjá presti. Lærusveinarnir løgdu so stóran dent á Orðið, at teir “...luttóku (brúktu sína tíð, goldu prísin, granskaðu fyri at skilja Meistaran) ... í ápostlanna undirvísing ...” Guds orð ikki bara gjørdi tey før fyri at standa ímóti lívsins avbjóðingum, men tá ið tey gjørdust flóttafólk, tí tey vórðu jagstrað, tóku tey orðið við sær og plantaðu nýggjar meinigheitir runt um í verðini. Áps. 8,4.

Mennist tú av Guds orði, so tað styrkir teg í hørðum tíðum og fyrireikar teg at kunna ávirka tína verð fyri Kristus?

Tey tóku tilbiðjan og lovsong í álvara. “... tey vóru støðugt í halgidóminum og lovaðu Gudi.” Luk. 24,53.

Fyri mong okkara merkir orðið “lovsangur” tað sama sum ein grein í skránni í sunnudagstænastuni – okkurt sum vit meira eru við til, enn at vit lata tað sýna eitt kærleiksfult hjarta, sum lovprísar Gudi. At vera áskoðari til eina sunnudagsgudstænastu er ikki tað sama sum tilbiðjan. Tey trúgvandi, sum vit møta í Nýggja Testamenti, skiltu Dávid: “Farið inn í portur við lovi, í forgarðar hans við prísi! Lovið honum! Signið hans navn!” Sálm. 100,4.

Vilt tú vera ein, sum tilbiður í álvara? So mást tú savna tína hugsan heilt um góðsku hansara, tá ið tú fert inn í nærveru hansara og av heilum hjarta bera fram títt takksemi fyri alt tað, sum hann er.

“... et Ord til Dagen”.
*Effie Campbell* umsetti.

---

Tann, sum ikki roknar við Gudi, dugir als ikki at rokna.

*e.c.* ums.

# Tríggir lyklar at brúka "í tí himmalska"

Hvørjir eru himmiríkisins lyklar, sum Jesus lovar Pæturi í Matt. 16,19? Um vit eisini lesa í Matt. kap. 18 vers 18-20, finna vit loyndarmálið. Her verður talað um tríggjar lyklar: "Sanniliga, sigi Eg tykkum: **Alt**, ið tit **binda** á jørðini, skal vera bundið í Himli; og alt, ið tit **loysa** á jørðini, skal vera loyst í Himli. Uppaftur sigi Eg tykkum: Verða tveir tykkara á jørðini samsintir um at **biðja** um okkurt - **veri, hvat tað vera má** - tað skal verða teimum givið av Faðir Mínum, Sum í Himli er. **Tí har sum tvey ella trý eru savnað saman í navni Mínum, eri Eg mitt ímillum teirra.**" (V.D. ums.)

1. **Alt**, ið tit **binda** á jørðini, skal vera bundið í Himli - hetta er **bindaravirksemi**.

2. **Alt**, ið tit **loysa** á jørðini, skal vera loyst í Himli - hetta er **loysanarvirksemi**.

3. Verða tveir tykkara á jørðini samsintir um at **biðja** um okkurt - **veri, hvat tað vera má** - tað skal verða givið teimum av Faðiri Mínum, Sum í Himli er - hetta er **bønarvirksemi**.

Mangir trupulleikar, sum vit møta, eru natúrligir og menniskjansligir trupulleikar, sum hava orsøk í hesari verð. Men nógvir trupulleikar, sum raka okkum her í verðini, hava í roynd og veru sína orsøk í tí andaligu verðini, í tí himmalska. Ef. 6,12 talar um bardagar móti "andaherliðum illskaparins í himnarúmdum" (á grikskum: í tí himmalska - t.e. í teirri ósjónligu verðini). Synd, sjúka, kríggj, hatur, neyð, harðskapur, perversitetur o.s.fr. eru bara sjónlig eyðkenni, sum hava sína orsøk í tí andaligu verðini. Tá ið so hesir trupulleikar skulu loysast, mugu vit treingja inn til sjálva orsøkina og rótina til trupulleikarnar. Og orsakirnar liggja í teirri andaligu verðini.

Vit skulu brúka **bindaravirksemi**, tá ið vit mugu binda Djevulin og hansara andsmaktir, og vit mugu brúka **loysanarvirksemi**, tá ið vit skulu loysa menniskju, sum eru bundin av Satani og at loysa Guds kraft. Og vit mugu brúka **bønarvirksemi**, tá ið tað er okkurt, sum vit ella onnur hava brúk fyri, ella tá ið Guds hjálp skal tilførast.

*Effie Campbell* umsetti.

# *Í ævinleikanum*

Úr lovsangi Mósesar: ”Harrin er styrki mín og lovsongur, og hann varð mær til frelsu; hann er Gud mín, og eg vil hálova honum.”

Tú, Guds lamb! O, sum lovsongurin skal verða borin tær um allar ævir. Lambið! Tú ert himmalsins miðdepil! Tú ert sjálvur himmalin!

Tað verður vælsignað at hitta síni kæru aftur í himlinum. Okkum leingist eftir tí degi. Tað verður undurfult at skilja, hvussu Gud hevur ført okkum – og at syngja lovsong Mósesar.

Men hetta er fátæksligt ímóti tí lovsongi, sum lambinum verður borin. Var onki Guds lamb, var heldur ongin himmal.

O, tann, sum var komin heim í Guds ríki og kundi skorið í at sungið songin! Hvør hevur uppiborið heiður sum lambið! Hvør tægr í mær skal lovprísa tí. Hvør andadráttur! Hvør hjartasláttur!

Syng! Syng! Tungan er loyst. Orð og tónar tróta ikki longur. Allar forðingar eru burtur. Syng lambsins song! Lov og heiður veri tær um ævir allar!

*t.* týddi.

# Guds hendur

Omma plagdi at siga: “Befala teg í Guds hendur.” Tað merkir at leggja seg í Guds hendur. Tá biðja vit: “Harri, nú leggi eg meg í tína hond, so ansar tú eftir mær.” Eg havi einaferð sæð eina tekning ella ein málning av einari stórari hond, og niðri í lógvanum lá eitt menniskja. Har er tryggasta staðið at vera, tí um Satan vil herja á okkum, so noyðist hann fyrst at nema við Guds hond, og tað torir hann ikki.

*e.c.*

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 30. nov. | Tekstur: | Áps. 12,1-17 + Matt. 7,7-8; | bíbliuorð: | Matt. 7,7 |
| 7. des. | Tekstur: | Luk. 1,26-31 + 36-45 + 56; | bíbliuorð: | Luk. 1,37 |
| 14. des. | Tekstur: | Luk. 2,1-20; | bíbliuorð: | Luk. 2,11 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74